## Ronaldinho vil til Onglands

Hóast hann ikki vil seta nakað navn á eitt nýtt felag, so tykist brasilski Ronaldinho at hava góðan hug at royna seg í enskum fótbólti. – Ein og hvør spælari hevur sjálvandi hug at royna seg í eini somikið sterkari kapping, sum enska Premier League er. Ronaldinho hevur á ongan hátt havt nakað serliga gott kappingarár í ár. Hann hevur verið á beinkinum hjá Barcelona, og seinastu mánaðirnar hevur hann ikki verið partur av brasilska landsliðnum.



## Ince skal venja Blackburn

Paul Ince, sum í síni tíð var liðfelagi við Mark Hughes í Manchester United, er maðurin, sum avloysa sama Hughes sum venjara í enska Blackburn. Ince, sum nú er 40 ár, vandi seinasta kappingarár MK Dons, og her hevur verið latið væl at avrikum hansara. Og ikki minst man tað telja rætta vegin fyri Blackburn, at talan er um ein fyrrverandi toppspælara, sum hevur eitt stórt navn, og sum í síni tíð sum spælari ikki var bangin fyri at siga, hvat skápið skuldi standa.

B68-Víkingur 1-0 (1-0):

# Fyrsti heimasigurin



*Jann Ingi Petersen var ískaldur, tá hann fekk møguleikan at sparka fyrsta heimasigurin hjá B68 heim*

*savnsmynd*

*B68*

*Víkingur*

**Í sættu royndini eydnaðist toftamonnum at vinna á heimavølli, og nú er niðurflytingarvandin heili seks stig burturi hjá toftamonnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Undan sunnudegnum høvdu fimm heimadystir bert givið tvey stig til B68. Ein úrtøka, sum hvørki spælarar ella venjari vóru nøgdir um. Og var tað ikki fyri góðu úrslitini á útivølli hevði liðið ligið rættiliga tungt í sjónum.

Hetta broyttist tó sunnudagin. Hóast B68 mátti vera leikbannað Vlada Filipovic fyriuttan, so tóktist hetta á ongan hátt at nerva. Avloysarin, Petur Meinhard Magnussen, hevði tó ikki tað heilt stóra at gera fyri steðgin. Andreas Lava Olsen var tó um at sleppa leysur tíðliga í dystinum, men annars sat heimaliðið á tí mesta.

Møguleikar spurdust eisini burturúr, og ta einu ferðina noyddist ein víkingur at sparka burtur á sjálvari málstrikuni. Men eftir góðum hálvum tíma kom tó hol á. Brotsspark varð framt móti Kristian Anthon Andreasen, og sum vant var Jann Ingi Petersen tryggur úr ellivu metrum.

### Vardu stigini

Eftir steðgin tók B68 seg longur aftur á vøllin. Setningurin var fyrst og fremst at verja borg, og tað gav Víkingi møguleika at leggja stórt trýst á. Veruligar opnar møguleikar gjørdist talan tó ikki um, men í nøgvum førum var talan um næstan og nærvið støður, áðrenn B68-verjan í evstu løtu fekk sparkað ella stúta bóltin av vandaleið.

Og hinvegin gav trýstið eisini kontra-møgulekar til heimaliðið. Tann største átti Jacob Bymar, tá hann varð spældur púrasta leysur, men Geza Turi vardi tó meistarliga fyri, soleiðis at Víkingur kundi halda fast um vónina.

### Kunnu fara avstað

Við fyrsta heimasigrinum sum barlast, so er lítil ivi um, at toftamenn nú veruliga gleða seg til komandi vikurnar. Undan summarsteðginum hevur B68 heimadyst móti bæði Skála og B71, sum liggja undir niðurflytingarstrikuni. Og geva teir báðir dystirnir fulla úrtøku, hevur B68 mest sum sagt definitivt farvæl við botnin við niðurflytingarvandan.

Hjá Víkingi er niðurflytingarvandin ikki reiðiliga nakað tema. Men hinvegin gera óstøðugu úrslitini, at liðið hevur sera ilt við at vinna seg nakað uppeftir á talvuni. Næstu ferð skulu teir royna seg á heimavølli móti suverena oddaliðnum, og so er spurningurin, um pílurin hesa ferð verður rætta vegin hjá Víkingi.

## Ov lítið við í dystinum

Magni Jarnskor, sum er hjálparvenjari hjá Víkingi, helt ikki, at hansara lið hevði ein av sínum bestu døgum á Toftum í gjár.

- Nei. Tað er kanska allar fyrstu løtuna og so teir seinastu 10 minuttirnar, at vit koma til nakrar møguleikar, men annars eru vit alt ov lítið við í dystinum, segði Magni Jarnskor í sendingini um 3. hálvleik á Rás2 í gjár.

- Vit fóru sjálvandi á vøllin fyri at vinna dystin, men tað riggaði bara ikki hesaferð. Hinvegin hevur B68 eisini sínar dygdir. Teir hava nakrar sterkar spælarar á miðvøllinum, og ikki minst gjørdu útlendingarnir hjá teimum góðir.

Um óstøðugu gongdina hjá Víkingi sigur Magni Jarnskor, at teir nú mugu vóna, at pílurin vendir rætt næstu ferð.

- Atli Gregersen hevur sagt tað fyrr í ár, at vit spæla bara væl aðru hvørja ferð. So tað er at vóna, at hetta er galdandi, tá EB/Streymur kemur á vitjan, segði Magni Jarnskor.

**-mørk**

Hjartaliga tillukku!
Vit ynskja EB Streymi hjartaliga tillukku við Løgmanssteypinum!

Ynskir
SPORTMASTER
NIKE
Tórshavn • SMS • Tel 319512
Klædnastuðul hjá EB Streymi